KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Klaksvíkar Býráð

Dagfesting: 07.12.2023 kl. 17:30
Málnr.: 21/01365 Gerðabók
Nevndarlimir: Karl Johansen, Atli S. Justinussen, Jógvan Skorheim, Gunvá við Keldu, Oddmar á Lakjuni, Jóhanna Christiansen, Eyðstein Ó. Poulsen, Óli M. Lassen, Signhild V. Johannesen, Tummas J. Lervig og Annika S. Biskopstø
Varalimir:
Ikki møtt:
Onnur: Jógvan Ósá, tekniskur stjóri
Protokollførari: Jensa Anthoniussen, fulltrúi

Málsyvirlit		
Til viðgerðar		
101/23	21/01280-248	Heimild at brúka inntøkur av sølu
102/23	23/01367-1	Dagstovna- og frítíðarskúlagjald strikast í desember 2023 - *eykajáttan, seinna viðgerð*
103/23	21/02171-28	Umsókn um broyting av vegaføring í samband við bygging á Torvgøtu og Bumshamarvegi, matr.nr. 34c og 34d, Klaksvík

Til viðgerðar

101/23
21/01280-248 Heimild at brúka inntøkur av sølu

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	07.12.2023	115/23
2 Fíggjarnevndin	07.12.2023	100/23
3 Klaksvíkar Býráð	07.12.2023	101/23

21/01280-248 Heimild at brúka inntøkur av sølu

Frágreiðing um málið:
Klaksvíkar býráð samtykti á fundi tann 23.03.2023 at gera sáttmála við arbeiðstakara um 1. byggistig á Fossum (víst verður til skjal nr. 21/01280-153).

Á fíggjarætlanini fyri 2023 eru 10 mió. kr. settar av til endamálið. Sum lýst í skjali nr. 21/01280-153, so er fíggjarligi tørvurin í 2023 størri, og samtykt er, at restupphæddin skal fíggjast av inntøkum í samband við sølu av grundstykkinum á Fossum.

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin

Fíggjarligar avleiðingar:
Ein varlig meting sigur, at Klaksvíkar kommuna í inniverandi ári fær uml. 8 mió. kr. inn í samband við grundstykkjasølu á Fossum.
Mett verður, at fíggjarligi tørvurin í 2023 verður uml. 16 mió. kr., tí er neyðugt, at Klaksvíkar býráð heimilar, at 6 mió. kr. av inntøkunum í samband við grundstykkjasølu á Fossum verða nýttar til at fremja verkætlanina.

Tilmæli:
Mælt verður til, at Klaksvíkar býráð heimilar, at 6 mió. kr. av inntøkunum í samband við grundstykkjasøluna á Fossum verða nýttar til at femja verkætlanina.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 7. desember 2023:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 04-12-2023.

Fíggjarnevndin 7. desember 2023:
Nevndin tekur undir við UBN 07-12-2023

Klaksvíkar Býráð 7. desember 2023:
Tilmælið frá FíN 07-12-2023 einmælt samtykt.

102/23
23/01367-1 Dagstovna- og frítíðarskúlagjald strikast í desember 2023 - *eykajáttan, seinna viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Fíggjarnevndin	21.11.2023	92/23
2 Klaksvíkar Býráð	23.11.2023	96/23
3 Klaksvíkar Býráð	07.12.2023	102/23

23/01367-1 Dagstovna- og frítíðarskúlagjald strikast í desember 2023; eykajáttan

Frágreiðing um málið:
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum 23. november 2023.

Lógargrundarlag:
§ 41 í Kommunustýrislógini:
Stk. 1. Kommunustýrið hevur játtanarmyndugleikan. Ikki kann verða farið undir eitt arbeiði, fyrr enn neyðug játtan er tøk.
Stk. 2. Kommunustýrið kann tó um neyðugt veita eykajáttan. Eykajáttan krevur tvær viðgerðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. Við hvørja eykajáttan skal verða víst á, hvussu hon verður fíggjað

Fíggjarligar avleiðingar:

Foreldragjald des 2023 - býtt á stovnar		
Rakstrarstað	Des	Jan
Dagrøktin	92	92
Fjallafípan	110	110
Blákollan	60	60
Barnahúsið Margit	61	61
Dr. Margrethu Barnagarður	113	113
Mylnuhúsið	68	68
Baldursbrá	36	36
Frítíðarskúlin Snjalla Bjalla	160	160
Tilsamans	700	700

Tilmæli:
Vísandi til samtykt á temafundi II tann 17. november 2023, verður mælt til at fíggja samtyktu strikingina av foreldragjaldinum fyri desember 2023 við eini eykajáttan á 700.000 kr., sum verður fíggjað av tøka peningi kommununnar.

Fíggjarnevndin 21. november 2023:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 20-11-2023.

Klaksvíkar Býráð 23. november 2023:
Tilmælið frá Fíggjarnevndini 21. nov. 2023 einmælt samtykt.

Klaksvíkar Býráð 7. desember 2023:
Tilmælið frá Klaksvíkar Býráð 23. november 2023 einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

103/23
21/02171-28 Umsókn um broyting av vegaføring í samband við bygging á Torvgøtu og Bumshamarvegi, matr.nr. 34c og 34d, Klaksvík

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Ferðslunevndin	13.11.2023	48/23
2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	13.11.2023	113/23
3 Tekniska Nevnd	15.11.2023	75/23
4 Klaksvíkar Býráð	07.12.2023	103/23

21/02171-28 Umsókn um broyting av vegaføring í samband við bygging á Torvgøtu og Bumshamarvegi - matr.nr. 34c og 34d, Klaksvík

Frágreiðing um málið:
Í skrivi frá umsitingini, dagf. 06-11-2023, verður greitt nærri frá málinum.

Í stuttum snýr málið seg um, at umsøkjarin hevur fingið byggiloyvi til íbúðabygging á matriklunum við teimum parkeringsásetingum, sum BK17 hevur, men fremjanin av parkeringsplássum til niðaru

íbúðarøðina hevur ikki fylgt hesum. Umsøkjarin hevur spurt, um kommunan heldur kann broyta vegaføringarnar á Torvgøtu og Bumshamarsvegi, enn at longu gjørt arbeiði má gerast umaftur.

Burðardygd og heimsmálini:
Mál.11: Gera býir og búsetingar inkluderandi, tryggar, haldgóðar og burðardyggar

Lógargrundarlag:
Bygningskunngerðin BK17, Almenna byggisamtykin fyri Klaksvíkar Kommunu og HÅNDBOG ANLÆG FOR PARKERING OG STANDSNING I BYER (Vejdirektoratets vejregler) í samband við vegagerð

Fíggjarligar avleiðingar:
Ókent - Ferðslugrannskoðara

Tilmæli:
Tekniska fyrisiting hevur umrøtt umsóknina og umsøkjarans broyting av vegføringunum á Torvgøtu og Bumshamarsvegi.

Okkara almenna byggisamtykt sigur, at akbreytir skulu vera **minst 6,0 m**, men byggivaldið kann tó loyva, at vegir, ið eftir meting tess ikki fara at hava ferðslutýdning, (vit vita ikki um hesir vegir ikki koma at hava ferðslutýdning) kunnu **setast niður í 5,0 m.**

Eftir innsenda uppskotinum við Torvgøtu verður akbreytin sett **niður í 4,7 m**.
Vendiradius kann ikki yvirhaldast. Tað vil siga, at bilar koma inn yvir parkeringplássini hjá hvørjum øðrum

Aðrir umsøkjarar hava áður søkt um líknandi, men hava ikki fingið loyvi at keypa part av tí kommunala vegakervinum til egna parkering.

Út frá omanfyrinevnda kann hetta gerast eitt ”fordømi” fyri onnur líknandi mál, og tá kommunan ongar ætlanir hevur um at broyta ferðsluviðurskiftini á Torvgøtu ella Bumshamarvegi, so vil tekniska fyrisiting mæla til, at umsøkjarin skal halda seg til givna byggiloyvið.

Ferðslunevndin 13. november 2023:
Vísandi til tilmælið, dagf. 06-11-2023, mælir nevndin frá, at vegirnir verða broyttir.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 13. november 2023:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 06-11-2023.

Tekniska Nevnd 15. november 2023:
Nevndin tekur undir við UBN 13-11-2023.

Klaksvíkar Býráð 7. desember 2023:
Málið tikið av skrá.

Fundurin lokin kl. 17:45